LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprisur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL CORSA 1.4
til søluvi, árg. 1997, km 82.000, í góðum standi.
Tlf. 216395

MAZDA 626 GL 2.0
árg. 87, koyrir sum ein røvari, í góðum standi, heilt bíliga til søluvi. Royn hann og gev eitt boð.
Tlf. 515960/315960

OPEL ASCONA 1.6
árg. 98, vælhildin, koyrt 52.000 km, til søluvi fyri 75.000,-
Tlf. 220549

TIL SØLUV
Karburator og tendring til Honda Civic 1.5 LSi til søluvi fyri 1.500 kr.
Tlf. 224910

SPORTFELGUR
4x100 við dekkum, 15" 195/50/15, passa til Audi, Honda, Opel, VW, Mazda, Daewoo og Toyota, til søluvi fyri 4.500 kr.
Tlf. 224910

CITROEN XANTIA 1.9 TD
árg. 05/96, koyrt 143.000 km, til søluvi um hóskandi boð fæst.
Tlf. 228774

VW POLO
árg. 2001, vælhildin og í góðum standi, til søluvi vegna flyting.
Tlf. 261169

OPEL ASTRA 1.7 TD
Caravan til søluvi um hóskandi boð fæst, árg. juli 96, koyrt 89.200 km.
Tlf. 212320

FORD ESCORT
Ford Escort xr3i, árg 87. Nýsýnaður, sóltak og el-rútar. Til søluvi,
ring 506407

FORD SIERRA 1.6 CLX
árg. 88 fyri 8.000 kr. er í góðum standi.
Tlf. 509775

TOYOTA LANDCRUISER
árg. 85, model HJ60, nýsýnaður, til søluvi.
Tlf. 311604/211604

MITSUBISHI LANCER
Ein gráur Mitsubishi Lancer til søluvi, diesel, árg. 1987. Pikadekk á felgum fylgja við. Prísur 4.000,-
Tlf. 421451/721451

FORD FIESTA DIESEL
árg. 95, koyrt 175.000 til søluvi.
Tlf. 332203/265343

TOYOTA CAMRY 2.0i
árg. 89, koyrt 192.000 km, til søluvi fyri 6.000 kr. Eitt gott Pioneer anlegg við diskbox og subwoofer fylgir við.
Tlf. 455711

DIESELBILUR
bíliga til søluvi, Ford Scorpio 25D árg. 87 til søluvi fyri kr. 10.000,-
Tlf. 223037

FORD SCORPIO 2.5 TD
árg. 91. Bilurin er silvurgráur og í sera góðum standi, sýnaður des. 03. Útgerð: fleguspælara, 15" alufelg., tokulyktir, el-rútar framman, el-spegl við hita, servostýring, sóltak, 4 pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 268680

BILUR VIÐ SKAÐA
Saab 9-5 við skaða árg. 98, koyrt 68.000 km, fæst bíliga.
Tlf. 583388/580474

PEUGEOT 206 2.0 GTI
svartur, árg. 04/02, koyrt 45.000 km, senkaður, sportfelgur, til søluvi fyri kr. 140.000,-
Tlf. 218015

TAGBOX OG TAGBØJLER
Ny Thule Ocean 100 tagbox sælges for kr. 1500,- 1 sæt originale VW tagbøjler (passer til VW-golf og Audi). Kr. 800,-.
Tel. 321999

TIL SØLUV
Ford Scorpio árg. 86 km. 178.000. Koyrir vael, og er í góðum standi.
Tlf. 254053

NISSAN CHERRY N12
árg. 85 til søluvi fyri 3.000,- koyrir vael, men krevur ábøtur.
Tlf. 316988/257276 eftir kl. 15

FORD FIESTA 1.3
árg. 95, bilurin er í góðum standi, men brotnan gearkassa, aut. gear, bíliga til søluvi.
Tlf. 271439

MAZDA 323
árg. 86, bíliga til søluvi. Sýnaður í februar.
Tlf. 222236

VOLVO 240 GL
til søluvi fyri lítið og lætt (hevur plátur).
Tlf. 210986

4 DEKK
2 x summardekk, 2 x vetrardekk, øll á felgum, til søluvi fyri tilsamans 1.000,- kr.
Tlf. 594453

OPEL KADETT GSI
árg. 90 til søluvi. Powerstýring, anlegg, sóltak, sportfelgur, men krevur smærri ábøtur. Gevið eitt boð. Bilurin kann siggjast við Fornminnissavnið í Hoyvík.
Tlf. 580989

TIL SØLUV
Ein karburator Pier-Burg 2B4 til BMW 316 fyri 800 kr.
Tlf. 375186

TIL SØLUV
4 Dunlop summardekk 185/70-14 sum nýggj fyri 1800 kr.
Tlf. 375186

VW POLO CLASSIC 1.9 SDi
árg. 12/97 til søluvi fyri 60.000 kr.
Tlf. 266172

FORD SIERRA 1.6
árg. 1984, til søluvi fyri 2.000,- kr.
Tlf. 221756

GOLF II TD
til søluvi, nýsýnaður, árg. 86, hevur powerstýring, sentrallás, sóltak, eisini fylgir ein Golf II TD við til eykalutir.
Tlf. 214100

TIL SØLUV
Saab 900 frá 1986 bíliga til søluvi.
Tlf. 541440

MOTORUR TIL BMW TD
árg. 88 ella møguliga bilur við skaða ynskist til keyps.
Tlf. 581515 eftir kl. 14

CITROEN BX DIESEL
1.9 TDI árg. 1990 í góðum mek. standi til søluvi fyri 14.000 kr.
Tlf. 226099, Søldarfjørður

OPEL ASCONA 1.6
árg. 86, bíliga til søluvi, krevur nakrar ábøtur.
Tlf. 250658/532369

VW GOLF DIESEL
árg. 86, aug. gear, í góðum standi, til søluvi fyri 15.000 kr.
Tlf. 223302 ella 311006

TOYOTA COROLLA
Galla 1,3 i, árg. 95 til søluvi um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444844

TIL SØLUV
Silvurgráur Toyota Corolla við 1600 bensinmotori, árg. 1999, koyrt 80.000 km. Sportfelgur fylgja við.
Tlf. 449251/269653

FORD MONDEO ST.W. 1.8 16V
árg. 1998, koyrt 85.000 km, sær gott út, hevur air-condition, tjóvarialarm, el rútar og -spegl framman.
Tlf. 250211

SUZUKI SWIFT 1.6
árg. 1990-91, koyrt 165.000 km, hægsta boð yvir 10.000 kr. Nýsýnaður. Nýggir eykalutir til søluvi til ymiskar bílar. Ring og hoyr nærri um prísir.
Tlf. 322049/522049

TIL SØLUV
Saab 9.5 við skaða, árg. 98, koyrt uml. 58.000 km, verður seldur fyri 18.000 kr.
Tlf. 583388 ella 580474

TOYOTA AVENSIS
2.0 TD árg. 04/99, met. gráur, 133.000 km.
Tlf. 422435/214416

Amboð

EIN MASSEY FERGUSON
135 traktorur til søluvi, last við rimum og rist í botni og ein silosvans fylgja við.
Tlf. 210104

KOSMETOLOG ÚTGERÐ
2 stk. Voks apparat, 1 stk. Tezla, 1 stk. Magic peeling sum inniheldur roterandi bustir, spray til skintonic o.a.
Tlf. 319182/284300

HOYVENDARI
av slagnum Molan 100 til søluvi fyri kr. 3000,-
Tlf. 261864

ELEKTRISKUR HØVIL
Lítið bróktur elektriskur høvul, Metabo, til søluvi. Nývirði 12.000,-
Tlf. 371339

VIÐFESTISVOGNAR
Tredal vognar, við spiral fjaðrum til søluvi. Kunnu siggjast á heimasíðu www.tredal.no
Tlf. 218101

BLANDIMASKINUR
Lescha blandimaskinur úr kr. 2.995,00.
Pf. Klement Petersen, tlf. 447560

Arbeiði

VIT ERU TVEIR
16-17 ára gamlir dreingir, ið søkja arbeiði í Eysturoynni. Um tú hevur arbeiði til okkum, so ring á
tlf. 441160 ella 441670

TILBOÐ YNSKIST
at mála randarhús, 2 síður.
Tlf. 314844

TIL SØLUV
Hitalíkam til akvarium til søluvi.
Tlf. 583388

GRAVSTAÐAR RØKTIN
Tað ið tygum ikki megna, megna vit. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 226270

17 ÁRA GOMUL GENTA
søkir arbeiði í Havn eftir skúlatíð og í vikuskiftunum. Alt hevur áhugað.
Tlf. 256446

JOBANNONCE
Jeg er en pige på 19 år som netop er startet i 3.G. Efter at jeg bliver student næste sommer (2005), har jeg et brændende ønske om at komme et år til Færøerne. Mit højeste jobønske er at arbejde som praktikant på et glaspusteri, men i øvrigt har alle andre jobs også interesse. I min fritid dyrker jeg triathlon i Odense Triathlonklub. Med venlig hilsen Trine Malig Pedersen, Bispeengen 115, 5270 Odense N, Danmark
Email: Trine_Malig_Pedersen @hotmail.com

Barnaansing

DAGRØKT SØKIST
gerandisdagar til fitta 18 mánaðar gamla gentu í Hoyvík. Áhugað kunnu ringja
tlf. 311420 ella 313703

BARNAGENTA SØKIST
til at ansa eftir 16 mðr. gamlari gentu annaðhvørt vikuskifti. Og tveir til tríggjar dagar mitt í viku frá kl. 17-22.
Tlf. 321350 ella 350002

Barnaútgerð

TIL SØLUV
Barnastólar og barnaborð úr timbur – til 4 børn, til søluvi fyri 700 kr.
Tlf. 224910

GRULVIGARÐUR YNSKIST
Er tað nakar ið hevur ein grulvigarð í góðum standi at selja mær, botnurin skal helst kunna flytast upp og niður.
Vinarliga ring á tlf. 319293

BARNAVOGNUR
1 ára gamal »Trille« barnavognur til søluvi. Einans bróktur 6 mðr. lift, puslitaska og regnskjól fylgja við. Nýprísur 6.500,- til søluvi fyri 2.500,-
Tlf. 318488

BARNAVOGNUR TIL SØLUV
Brio combivognur, myrkblár, lift fylgir við. Nýprísur 5000 kr. til søluvi fyri 1500 kr.
Tlf. 507926 ella sms'a

BARNAVOGNUR
við regnslagi avheintast fyri 300 kr.
Tlf. 319912/519912

TIL SØLUV
Britax luksus bilstólur til søluvi fyri 600 kr. Nýprísur 1.200 kr., sum nýggjur.
Tlf. 320415

BLÁUR BARNAVOGNUR
við lift 800 kr. Bilstólur 0-6 mðr. 200 kr. Tremmusong 200 kr. Beristativ, til børn, 6 mðr. og eldri, at hava á rygginum 400 kr.
Tlf. 517542

TIL SØLUV
Ein vælhildin Brio barnavognur til søluvi, eisini ein vælhildin tremmusong v/ madrassu til søluvi. Alt hetta er bert brúkt til 1 barn.
Tlf. 223642/227425

KOYRISTÓLUR TIL SØLUV
av merkinum Simo, við lufthjólum, regulera hondtak, skinnposa (sera lítið bróktur og í góðum standi) er bláur (ikki myrkblár), myrkt stell, selist vegna flyting. 1 ára gamal. Nýprísur 5.450, nú 3.500,-
Tlf. 455519

BRIO BARNAVOGNUR
nýtt stell, næstan ikki bróktur. Til søluvi fyri 2.500 kr.
Tlf. 226445

HVÍT TREMMUSONG
Vælhildin hvít tremmusong til søluvi. Songin hevur hjól og onnur síðan kann lyftast upp og niður, eins og botnurin kann lyftast upp og niður.
Tlf. 311688/ 211689

BRIO KOMBIVOGNUR
v/ lufthjólum til søluvi.
Tlf. 310305/510305

BARNAVOGNUR TIL SØLUV
Ein vælhildin Emaljunga barnavognur við lufthjólum, babylift, regnslagi, fluguneti og tasku bíliga til søluvi.
Tlf. 310036/264541

Bátaútgerð

SNELLUR TIL SØLUV
7 BF5 svenskar el-snellur til søluvi, tær eru 3 ára gamlar og lítið brúktar.
Tlf. 226817

IW-25 KABINUBÁTUR
við 75 hk Volvo Penta, radara, ekkoloddi, plottara við GPS, VHF og gummibáti, til søluvi um hóskandi boð fæst.
Tlf. 227261

Bingo

GOTT BINGO
verður mánadagin 23. august kl. 19 í Pálsstovu.
Astma- & Allergifelagið

GOTT BINGO
verður í Tórshøll leygardagin kl. 20.00. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1.000,-. Eisini verður spælt miniBingo 20 kr. spæl og bingola. Øll eru vælkmoin.
Tórshøll

GOTT BINGO
Gott bingo verður í róðrarneystinum á Argjum hósdagin 19/8-2004 kl. 19. Full pláta 400,- 6./12. spæl 600,-. Høvðusvinningar á lutaseðli 2 baljur fullar av mati, eyka spæl, koyring heim aftaná, møti fjølment.
Argja Róðrarfelag

Bøkur

BØKUR TIL SØLUV
Bøkur til stoddfr. deild í Studentskúlanum til søluvi. Ram på biologien kr. 140,- Lær teg enskt kr. 50,- Fransk bogen kr. 130,- Isis kemi C kr. 180,-
Tlf. 262991

ÆTTARBÓKIN
»Niðursetufólk inni á Fjørð í Vestmanna«. Ynskir tú at ogna tær hesa bók, vinarliga ring til
tlf. 421086/311844/211845

FHS-BØKUR
FHS-bøkur bíliga til søluvi. Ring og hoyr nærri á
tlf. 227439

TIL SØLUV
Nakrar bøkur til SIT, el-deild, til søluvi. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 315754 eftir kl. 15

SKÚLABØKUR TIL SØLUV
Fysik en studiebog 100 kr. El-teori 250 kr. Installationer 250 kr. Grundforløbet 250 kr. Hin ósjónligi Wats Wahl 100 kr. Basic Technical English + Workbook 200 kr.
Ring 508923

SKÚLABØKUR TIL SØLUV
El-teori 250 kr. Installationer 250 kr. Fysik – en studiebog 100 kr. Teknisk Matematik + formelsamling 800 kr.
Ring 506923

GUINNES REKORDBØKUR
Árg. 1982/83/84/85/86/87/88/89/97 og Børnenes rekordbøger 1994. Til søluvi fyri bert 35 kr. (+ frakt).
Tlf. +45 86448627/+45 26747474

BØKUR TIL 1. G. MÁLSLIG
Bøkur (í góðum standi) til 1.g málslig grein, bíliga til søluvi. t.d russisk, biologi o.s fr.
Tlf. 229557

Burturm. /funnið

HEY
Um nakar hevur sæð tvær lítlar skjaldbøkur – ella bara eina - við eru rýmdar, so vinarliga ring til mín. Eg sakni tær nógv !
Elsa Anna tlf. 316895 ella 211139

BRILLUR FUNNAR
úti í Bø. Eigarin kann fáa tær aftur við at venda sær til
tlf. 332380 ella 214386

BURTURMIST Á ÓLAVSØKU
Um nakar hevur funnið eitt belti til føroyskan kvinnubúna (spennið av slagnum hestaskógvur) burturmist ólavsokuaftan í Tórshavn, so vinarliga ring.
Tlf. 314057

EIN GRÁ NOKIA 3330
fartelefon er mist vekk á Ovastevnuni í Nólsoy leygarnáttina, tann við finnur hana, biðist vinarliga ringja á
tlf. 422368

Býli

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð í vesturbýnum til leigu. Eitt lítið kamar, stór stova, (ca. 35 fermetrar) kokur, egin inngongd og gott útsýni. Prísur: 5.500,- pr. m.
Tlf. 2173003

ÍBÚÐ Í KBH. TIL LEIGU
1-ver. íbúð til leigu í tíðarskeiðinum 1 sept.–1 nov. Við hentleikum so sum sjónvarp, tlf. og internet. Við øllum 4,000,- um mánaðin.
Tlf. 312746

HÚS Í VÁGI TIL SØLUV
árg. 1935, 3 hæddir, hvør hædd 56 fermetrar, grundareal 625 fermetrar, bilhús fylgir við.
Tlf. 373938

ÍBÚÐ TIL LEIGU
í Hoyvík fyri 5.800,- við ljós og hita frá 1. sept.
Tlf. 517244

HEY
Vit eru eitt par í 20'num. Er tað nakar ið hevur eina lítla íbúð til leigu fyri uml. 3000 kr um mánaðin. Vit gera bæði ítrótt, roykja ikki og gjalda altíð rættstundis.
vinarliga ring 269446

ÍBÚÐ YNSKIST
Lesandi við 3 børnum ynskir íbúð til leigu í Tórshavn ella har um leið, fyri sámuligan prís. Helst 3 kamur.
Tlf. 310877

PAR VIÐ EINUM BARNI
søkja íbúð í Suðurstreymi skjótast gjørligt vegna arbeiði. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 226443/225044

HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLUV
Um hóskandi boð fæst, eru eini hús í Sørvági til søluv.
Tlf. 333485/596010/222495

GJÓGV
Summarhús við Gjógv til leigu.
Tlf. 423138/313423 ella 321949

KAMAR TIL LEIGU
Gott lítið kamar í Hoyvík til leigu.
tlf. 583388

HEY
Vit eru eitt par í 20'num ið leita eftir eini íbúð. Vit roykja ikki, eru ítróttarfólk, og gjalda altíð rættstundis. Um onkur hevur eina íbúð standandi tóma í Tórshavn, Argjum ella Hoyvík og hetta er nakað fyri teg, vinarliga ring á
tlf. 261167 og 269446

SUMMARHÚS Í LEYNUM!
Hevur tú hug at njóta nakrar dagar ella eitt vikuskifti í Leynum, so er møguleiki at leiga eini nýumvælá eldri hús við øllum hentleikum.

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 946
Stað: Tórshavn (helst nær miðbýnum)
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: 200 m²-400 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Nr. 947
Stað: Kvívík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 80-90 m²
Ynskir: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Mesti kostnaður 800.000,-

Nr. 948
Stað: Tórshavnar kommuna
Slag av veiðu: Sethús, tvíhús ella íbúð
Stødd: Alt hevur áhuga
Ynskir: 2-3 kamur
Kostnaður: Mesti kostnaður 800.000,-

Nr. 949
Stað: Gøta, Leirvík, Søldarfjørð, Skálafjørð, Skipanes
Slag av veiðu: Sethús, tvíhús ella íbúð
Stødd: 40-80 m²
Ynskir: 3 kamur
Kostnaður: Mesti kostnaður 500.000,-

Nr. 950
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Sethús við kjallara
Stødd: Alt hevur áhuga
Ynskir: 3 kamur
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.000.000,- (møguliga í býti við onnur hús)

Nr. 951
Stað: Tórshavn, helst nær Hoyvíkshaganum
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 130-150 m²
Ynskir: 4 kamur og ikki eldri enn 1970
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.400.000,-

Nr. 952
Stað: Hoyvík, Tórshavn, Argir
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 120 m²
Ynskir: Max. 15 ár
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.600.000,-

Nr. 953
Stað: Hoyvík, Tórshavn, Argir
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Minst 300 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 500.000,-

Nr. 954
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Uml. 400-500 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 450.000,-

Nr. 955
Stað: Suðurstreymoy
Slag av veiðu: Traðarstykki
Stødd: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Uml. kr. 100,- pr. m²

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

AKVARIUM
112 l akvarium við ljósi og borði til søluvi fyri 500 kr.
Tlf. 315491

KETTLINGUR
Ein ógvuliga fittur og góður kettlingur, hálvur persari, loðin hannur, mamman er tolerant og góðslig, fer bara til djóravin.
Tlf. 316573 eftir kl. 20

KANINUNGI
Sera fittur og vakur kaninungi (hannur) fæst við at avheinta hann.
Tlf. 316807

DVØRGAHAMSTRARAR
v/ búri til søluv. Sera fittir.
Tlf. 320150

UNDULÁTAR
Fýra undulátaungar frá juni mánaði í ár til søluv.
Tlf. 332921

BORDER COLLIE
7 mðr. Border collie verður latin djóravini, vegna serligar umstøður.
Tlf. 217844/228337

KETTLINGAR
Sera fittur kettlingur verður latin til djóravin. Mamman er loðin, kann latast um eina viku.
Tlf. 452138/752138

HUNDAHVØLPAR
Tveir fittir hundahvølpar fáast við at avheinta teir. Mamman er puddil.
Tlf. 333485/596010

HVØR VIL EIGA MEG?
Eg eri ein sera fittur hundahvølpur, svartur við hvítum labbum. Eg eri knapt 8 vikur og kann skjótt flyta inn til ein hundavin.
Ring 312090

WEST HIGHLAND WHITE TERRIER
sunnir og sterkir hvølpar til søluv. Lítil hundur ið er vælegnaður til tað føroyska veðurlagi. (Onnur hundaslog kunnu eisini skaffast). Ring og hoyr nærri á
tlf +45 40684836

DVØRGAHAMSTRARABÚR
við tilhoyri til søluv fyri 150,-
Tlf. 317471, Marin

BORDER COLLIE
sera fittir hundahvølpar til søluv.
Ring 217214/447214

3 SERA FITTIR KETTLINGAR
fáast við at avheinta teir. 2 av teimum eru blandaðir við angora kettu.
Tlf. 319964/519964

2 FITTIR KETTLINGAR
fáast við at avheinta teir. Annar er striputur og hin svartur og hvítur. Ring og hoyr nærri
á tlf. 448922

HUNDAHVØLPUR
Ein svartur/hvítur hundahvølpur (hann hundur) 7 vikur gamal, fæst við at avheinta hann. Mamman lítil sera góð Border Collie.
Tlf. 449801/219393

KÁLVAR TIL SØLU
Kvigukálvur og tarvkálvur, 1 1/2 mánaðar gamlir. Tarvkálvur, 1 viku gamal.
Tlf. 254742

PUDDILHUNDUR
Ektaður puddilhundur til søluv.
Tlf. 582040

HVØR VIL EIGA MEG
Eg eri ein sera fittir og barnavinarligur hundahvølpur, svartur og hvítur. Mamma mín er sera góðslig. Eg kann siggjast á www.vitin.fo
Ring 318234

MARSVÍN
Sunt og kontaktsøkjandi marsvín, brúnan rygg, hvítan búk og ljóst snýði. Er uml. 1 ár og 4 mðr gamalt v/ búri + húsi + vatndunki. Fæst fyri kr. 500,-
Tlf. 310070/257941, spyr eftir Rannvu

Fundir

ÁRSAÐALFUNDUR
Elduvíkar Bygdar- og fornminnafelag heldur fund sunnudagin 29. august kl. 16.00 í skúlanum í Funningsfirði. Skrá: 1. Kári Thomsen frá Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag heldur fyrilestur. Her eru øll vælkomin. 2. Ársaðalfundur við skrá smb. lógunum.
Nevndin

Innbúgv

TIL SØLU
Leðursofa 2.500 kr., leðurstólur 1.500 kr., sofaborð 800 kr. ella samlað 4000 kr.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Ljóst sjónvarpsborð 400,- Song 200 x 90 uttan botn, við madrassu 500,-
tlf. 421037/214142

ANTIKMØBLAR TIL SØLU
Sofa + 2 stólar, nýumvældir og hava ein grønan lit.
Tlf. 317653

SOVISOFA
bert 5 mánaðir gomul til søluv fyri 2.000 kr.
Tlf. 510583

TIL SØLU
Hvítt sjónvarpsborð á hjólum stødd: h.63 x b.72 x d.45 cm, við 2 hillum og 1 skuffu til videobond niðri undir, bíliga til søluv.
Tlf. 213058

HVÍTT SJÓNVARPSBORÐ
á hjólum, stødd: h.55 x b.61 x d.40 cm. har ovari partur av borðinum kann snarast runt, við 2 hillum og glashurðum niðri undir, bíliga til søluv.
Tlf. 213058

TREMMUSONG
Lakk/bók tremmusong við madrassu til søluv fyri kr. 400,-
Tlf. 319396 eftir kl. 18

HØG BARNASONG
1 m. høg barnasong (70 x 200) úr lakfuru við skrivaraborði v/ reol undir til søluv fyri kr. 800,-
Tlf. 319396 eftir kl. 18

TIL SØLU
Møblar úr bambus: 2 pers. sofa, 2 stólar, borð og 1 reól til søluv fyri 1500 kr.
Tlf. 510490

TIL SØLU
Tvær nýggjar boxmadrassur 90 x 200 til søluv vegna plásstrot.
Tlf. 510490

YNSKIST TIL KEYPS
Sovisofa ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 310039 eftir kl. 18

BÍLIGA TIL SØLU
2 madrassur bíliga til søluv á 200 x 70 cm.
Tlf. 314944-580604

TIL SØLU
3 + 2 pers. sofa, sofaborð og skenkur úr bók til søluv vegna flyting.
Tlf. 320544 eftir kl. 17

TIL SØLU
Furu spisiborð við 2 eyka plátum og 4 stólar og furu skenkur við yvirskáp til søluv vegna flyting.
Tlf. 313014

KLÆDNASKÁP
loft til gólv (249 cm) br. 123 cm. til søluv fyri 300 kr.
Tlf. 210554

SOFABORÐ
Eitt glas sofaborð (140 x 80cm) við blonkum beinum til søluv fyri 400 kr. Sær út sum nýtt.
Ring 423772 ella 224517

TIL SØLU
Gomul divan og brúkt sovisofa kr. 300,-
Tlf. 314678

NIÐUR TIL DK AT LESA?
Flytigóðs í sera góðum standi bíliga til sølu! Ideelt til kollegieíbúð. Boxmadrassa á 120 cm (v/ beinum), skrivaraborð, skrivaraborðstólur, klappborð og lítil ovnur. Møblarnir standa í løtuni á Oyrasundskollegienum.
Tlf. 313275 ella 265015, Anna

TIL SØLU
Eitt lítið køksborð til søluv fyri 300 kr. stødd 68 x 68 cm, kann longjast við 32 cm.
Tlf. 250211

SJÓNVARPSBORÐ
metal, alugrátt, hill undir, til søluv.
Tlf. 421167 e. kl. 17 ella 257076

Barnavinarligt umhvørvi. Ring og hoyr nærri.
Gunnvør 313029/503029 ella Ása 443321/212249

LÍTIL ÍBÚÐ Í KBH
Íbúð til leigu í Keypmannahavn. Liggur mitt í býnum. Til leigu í 1–1 1/2 mánaða.
Tlf. 313474

ÍBÚÐ Í ÁRHUS
3 verilsis íbúð í Árhus C til leigu beinanvegin. Umleið 83 ferm. í tveimum hæddum. Í friðarligum umhvørvi, 2 min. frá gongugotuni. Húsaleiga 6200,- umframt el.
Ring: 317950 ella 28181272, E-mail: allan@dalsgard

STÓR ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
Kokur, stova, bað/toilet og 2 kamur. Kostnaður 6.000,- + ljós og hita. 1 mðr. depositum. Skriva til
torshavno4@yahoo.dk

ÍBÚÐ YNSKIST
Par, eingin børn, bæði fast arbeiði, ynskja íbúð í Havn ella nærhendis, alt hevur áhuga.
Tlf. 583424

STÓR ÍBÚÐ TIL LEIGU
Stór Íbúð í Havn til leigu fyri 6000 kr. um mðr. við ljós og hita.
Ring 214334

ÍBÚÐ TIL LEIGU
á Oyrasundskollegiinum. 2-rúms, 35 fermetrar íbúð í M-blokkinum til framleigu 1/2 sept. ella 1. okt og fyribils framm til 1. jan. Egnað til bæði einstaklingar og pør. Hevur hetta áhuga, skriva til
martin@oek.dk

SETHÚS
á bygd, í góðum standi, til leigu fyri longri ella styttri tíð.
Tlf. 508878

ÍBÚÐ YNSKIST
bíliga á Skálafjørðinum.
Ring 262116 eftir kl. 18

SETHÚS Á KAMBSDALI
til søluv um hóskandi boð fæst.
Tlf. 224396

ÍBÚÐ YNSKIST
Par við barni ynskir eina íbúð skjótast gjørligt í Tórshavnar umráðnum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 216702 eftir kl. 18

FRÍTÍÐARHÚS
á Glyvrum til leigu.
Tlf. 281583

HÚS Í SKÚGVI
Pálshús er til leigu til hampafólk.
Tlf. 447583

SKOPUN – HAVA TIT HÚS
í Skopun og treingja tey til eina umvæling, ja leiga so okkum húsini og vit umvæla tey meðan vit leiga.
Tlf. +45 98451654/30327388

SKOPUN
Hús ynskjast til leigu í longri tíðarskeið skjótast gjørligt.
Umvæling innan og uttan kunnu vit tosa um. Fara væl um. Ring
+45 98451654/30327388

GOYMSLURÚM YNSKIST Í TÓRSHAVN
Vit søkja kjallaralokali ella líknandi til eykalutagoymslu. Vit skulu brúka í minsta lagi 100 fermetrar. Skal eisini brúkast sum handil.
Tlf. 322049/522049

ÍBÚÐ ELLA HÚS
Mamma og sonur ynskja eina íbúð ella hús til leigu í Tórshavn ella nær við. Max. 4.000,- má vera handicapvinarligt.
Tlf. 282761

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð í Keypmannahavn ynskist til leigu skjótast gjørligt.
Tlf. 509999

Dansur

HOYDANSUR Í HVALBA
Nú er hoyggið komið til høldar. Tað feira vit við stórum hoydansi í Roynhøllini leygarkvøldið 21. august. LM Band spælir góðan dansitónleik.
Royn

Dýr

DVØRGAHAMSTRARAR
Hvør vil eiga okkum? Vit eru tveir ungar og ein vaksin dvørghamstrari, sum leita eftir einum góðum heimi. Vit kosta 50,00 hvør.
Ring 319370/219370 e. kl. 17.30